Patil sigur, at sostatt søkti hann starvið – og fekk tað.

Men so hendi tað, at pápi hansara í India doyði og hann mátti fara heimaftur.

Hann sett seg so aftur í sambandi við setanarmyndugleikan og greiddi frá støðuni og at hann mátti fara heim í tríggjar mánaðir. Men var áhugi framvegis fyri at fáa hann til Vágs, kundi hann binda seg til starvið sum kommunulækni her í tríggjar mánaðir.

Patil sigur, at tá hevði ongin kommunulækni verið í Vági í næstan eitt ár, so tað var serstakliga stórur áhugi fyri at fáa hann til Vágs, hóast talan var um stutta tíð.

Soleiðis endaði hann – rættiliga tilvildarliga – í Vági.

Men longu á ferðini til Føroyar fór hann at ivast í, hvat hann nú hevði gjørt, tí hann møtti einum týskum ferðamanni, sum ikki kundi fata, at hann ætlaði sær til Føroyar at vera.

Men teimum dámdu so væl, at hann gjørdi av at siga læknastarvið í New York frá sær og verða verandi í Vági.

Sostatt varð Patil kommunulækni í Vági í samfull átta ár áðrenn hann flutti heimaftur til India.

Hann sigur, at tað var fyrst og fremst fólkið og friðurin, sum fekk hann at verða verandi.

– Vit vóru øll sum ein stór familja, sigur hann.

– Fólkini vóru so fitt og dámlig og her var so friðarligt, at vit gjørdu av at siga alt annað frá okkum, sigur hann.

– Veðrið og tær avmarkingar tað førir við sær, venur mann seg eisini við, leggur hann afturat.

Tey áttu eina lítla dóttir, Preety, sum varð eftir heima, men hon kom so til Føroyar, tá ið tey gjørdu av at verða verandi. Ímeðan tey vóru í Vági fingu tey so eina dóttir afturat, sum fekk navnið Payal.




*Tað var ikki sørt av afturhvarvið á samkomuni í Vági, nú tey vitjaðu aftur. Ikki minst var Preeti tikin á bóli, tá í ein gomul vinkona gav henni eina mynd, hon hevði broderað við nøvninum á øllum húskinum, tá ið hon gekk í meinigheitshúsið í Vági, tá ið hon var heilt lítil.*



*Tey høvdu eisini nógvan stuttleika burtur úr at hyggja at gomlum myndum. Her er tað Flemming Stenberg, í miðjuni, sum vísir Patil gamlar myndir úr Vági ímeðan Páll Poulsen úr Sumba, høgrumegin, hyggur at*

## Tikin á bóli

Patil viðgongur, at tað var strævið at vera kommunulækni í Vági, tí hann var einsamallur og hevði vakt døgnið runt, sjey dagar um vikuna.

– Tað var eitt rættiliga avbjóðandi arbeiði, sum hann málbar seg.

Og hann minnist eisini, at hann fekk eina harða byrjan.

– Ein av mínum allarfyrstu sjúklingunum var ein kvinna, sum hevði ilt í búkinum. Men tá ið eg kom heim til hennara, vísti tað seg, at hon var við barn og var komin til at eiga.

Patil sigur, at kvinnusjúkur eru hansara sergrein sum lækni. So hóast hann varð tikin á bóli og ikki hevði nakað serligt av útgerð við sær til eina føðing, visti hann, hvussu hann skuldi bera seg at, so hann tók ímóti barninum við sínum beru hondum og tað gekk alt uppá stás.

Men tá ið nalvastrongurn skuldi klippast, mátti hann í køksskuffuna eftir einum saksi.

> Tá ið nalvastrongurn skuldi klippast, máttu vit í skuffuna í køkini eftir einum saksi

Tá ið konan hevði átt, varð hon flutt á Suðuroyar Sjúkrahús.

Hann sigur, at yvirhøvur dámdi honum væl at vitja sjúklingarnar, fyrstu ferð, teir ringdu, tí hann vildi fegin læra teir at kenna.

Patil sigur eisini, at somuleiðis gjørdi hann av at hava viðtalu í Sumba av og á, heldur enn at allir sumbingar, sum høvdu ørindi til lækna, skuldu noyðast til Vágs hvørja ferð.

## Minst 10 orð dagin

Ein tann størsti trupulleikin, hann hevði, varð málið. Tí mátti hann hava tulk, sum sjúklingarnir kundu forklára støðuna fyri og sum síðani kundi týða til enskt fyri mær.

– Hetta var ikki ein støða, sum kundi halda fram, tí tað kundi eisini knípa at fáa sjúklingarnar at fortelja einum tulki, hvat teimum bagdu.

Tí setti hann sær fyri at læra føroyskt so skjótt sum gjørligt.

– Eg setti mær fyri at læra minst 10 nýggj orð um dagin.

> Eg setti mær fyri at læra minst 10 føroysk orð um dagin

Í hesum sambandi fekk hann undirvísing í føroyskum frá Robert McBirnie, men eisini børnini, sum komu at vitja, hjálptu honum væl.

– Eg minnist, at eg plagdu spyrja børnini, hvussu ymsir lutir itu á føroyskum, og alt í alt gingu tað einir tríggir ella fýra mánaðir, so kláraði eg meg so mikið væl á føroyskum, at eg kundi tosa við sjúklingarnar.

## Ov sterkt til vágbingar

Komi, sum er kona Ratnakant, hevði eisini sínar avbjóðingar, tá ið hon kom til Vágs, tí hon er vegetarur og etur hvørki kjøt ella fisk.

Tað hildu vágbingar vera nokk so merkiligt, tí hesum høvdu teir ikki verið úti fyri.

Tað kundi vera nokk so tórført, tí í Vági var í høvuðsheitum bara eitt sindur av frystum grønmeti at fáa, umframt nakað av frukt.

Men hon kláraði seg, eisini tí at tey heimanífrá plagdu at senda henni ymsa frukt og grønmeti.

Hon borðreiddi eisini við indiskum mati fyri vágbingum og tað høvdu teir ikki smakkað fyrr. Men hon sigur, at teimum dámdu matin, bara hann ikki var ov sterkur, so hon mátti vera varin við chili og øðrum góðum.

## Heim í føðingardag

Hesi 32 árini síðani Patil hjúnini fluttu aftur til India, hava tey mangar ferðir tosað um at koma aftur til Føroyar at vitja.

Tað er eisini týðiligt, at Føroyar hava rinið við tey, tí hóast tað ikki er gamal siður hjá teimum, hava tey øll árini, tey hava búð í India, hildið føroysk jól við jólatræi og gávum, fyri at hava eitt varðveita eitt fjálgt minni úr Føroyum.

Men so hendi tað, at ein av hansara gomlu sjúklingum, Kaspara Hjelm, fylti 80 og í tí sambandinum bjóðaði hon teimum í føðingardagin, sum varð hildin í Vági.

– Soleiðis kom tað í lag, at vit komu aftur.

Patil hjúnini hava havt samband við Kasparu alla tíðina og sostatt hava tey eisini verið javnan dagførd um støðuna í Vági og um, hvussu tað hevur gingist teimum ymsu fólkunum, so tey stóðu alt annað enn á berum, nú tey komu.

Nú tey hava verið heima, hava tey verið í ymsum bygdum, umframt at tey hava verið á sjúkrahúsinum, í eldrabýlinum og á læknamiðstøðini.

– Tað eru stór framstig hend hesi 32 árini og tað er gott at síggja, sigur Patil. Og nú eru tveir kommunulæknar, so tað er ikki so strævið longur, leggur hann afturat.

## Hevði slóðbrótandi viðgerð við til Vágs

Tá ið indarin, Patil, var í Vági í sjeytiárunum, var hann eisini rættiliga slóðbrótandi í síni viðgerð.

Hann var í USA og lærdi seg akupunktur og hann var tann fyrsti í Føroyum, sum viðgjørdi pínu við akupunktur.

Hann er eisini reiðiliga vísur í, at hann var fyrstur í øllum danska kongaríkinum við hesi viðgerðini, tí hann heldur seg minnast, at tá á døgum fóru danir til Noregs at verða viðgjørdir við akupunktur.

Men hann segði, at myndugleikarnir vóru sera lagaligir, tá ið hann søkti um loyvi at viðgera við akupunktur.

Eg fekk at vita frá landslæknanum, at bara tað ikki órógvaði mítt dagliga yrki sum lækni, kundi eg eisini viðgera við akupunktur afturat.

Og tað vóru rættiliga nógvir sjúklingar, sum tóku av hesum nýggja tilboði við góðum úrsliti.

Nú Patil er farin aftur til India, hevur hann gjørt sína egnu klinikk í Bangladore, har hann gevur alskyns sløg av pínuviðgerð, men felags fyri alla viðgerðina er, at hann brúkar ikki heilivág og at hon hevur ongi hjáárin.

Talan er um ymisk sløg av akupunktur, umframt viðgerð við lasara, ljósi, radiobylgjum o.s.fr.

Hansara viðgerð er so framkomin, at hann í fjør fekk eina framtaksvirðisløn fyri sítt virksemi.

Nú hann hevur verið í Føroyum, hevur hann eisini verið á Landssjúkrahúsinum og hildið fyrilestur um alternativa pínuviðgerð.

Serliga hevur hann tosað um, hvussu sjúklingar sum hava mist følilsi í sambandi við sukursjúku, kunnu viðgerast við alternativari viðgerð, uttan at brúka heilivág.